# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein spurningur um moral

Fangaflutningurin hjá CIA, har fólk í stórum tali eru flutt millum lond, er eitt mál, sum vit ikki sleppa undan at taka støðu til. Sum kunnugt snýr hetta seg um, at menn verða tiknir antin sum fangar í krígnum í Irak ella burturfluttir. Endamálið er at flyta hesar fangar til lond, har torturur er loyvdur avhoyringarháttur. Í vanligum vesturlendskum fólkaræði er fangapínsla ikki loyvd. Hetta verður mett sum ein barbariskur háttur, sum hoyrir fortíðini ella einaræðinum til. Eftir ellivta september er USA hinvegin farið sera langt til tess at avdúka ætlanir um yvirgang. Í hesi tilgongd er tað vorðið loyvt amerikonsku rættarskipanini at nýta upplýsingar, ið er fingnir til vega við fangapínslu. Hetta hevur so aftur elvt til avtalur millum USA og lond, har fangapínsla er lógligur partur av rættargangskipanini. Hetta er bakgrundin fyri einum máli, sum ferð eftir ferð kemur á forsíðurnar eitt nú í Danmark í samband við loftvegis flutning av fangum.

Týskir, danskir og bretskir fjølmiðlar hava avdúkað og væl og virðiliga skjalprógvað, at fólk undir illgruna fyri yvirgangsætlanir verða tikin og burturflutt til lond, ar CIA sleppur at avhoyra tey undir pínslu. Tær upplýsingar, sum her koma fram, sannar ella skeivar, vera eftirfylgjandi brúktar í rættarmálum í USA ella tær verða brúktar at forða ætlaðum yvirgangi. Tað er skjalprógvað, at CIA við einum privatum flogfelagi hevur brúkt loftrúm hjá ríkisfelagskapinum til slíkan fangaflutning. Tað er eisini avdúkað og skjalprógvað, at hesi flogfør í ávísum førum hava lent á flogvøllum í ríkisfelagskapinum, mest í Grønlandi, men eisini í sjálvum Danmark. Almenningurin í báðum londum er ikki fegin um hetta, sum gongur fyri seg í loftrúmum teirra. Hetta stríður móti øllum vanligum humanum princippum eins og hetta er beinleiðis í stríð við altjóða avtalur.

Tað má tí sjálvsagt vera í lagi, at føroyska landsstýrið roynir at forða hesari ferðslu í okkara loftrúmi. Víst er loftrúmið eitt ríkismál, har vit ikki hava lóggávuvald, men slík viðurskifti forða vanliga ikki okkara politikkarum at hava eina meining og at gera sína ávirkan galdandi. Tað er tí alla æru vert, at landsstýrismaðurin við uttanríksmálum ætlar at steðga hesum ólógliga flutingi. Hetta er ein spurningur um vanligan moral og siðsemi. Hava vit, tá avtornar, ikki talað at ella roynt at steðga hesum óskili, so eru vit saman við USA og CIA sek í einum álvarsomum broti á altjóða mannarættindi. Tað er tí torført at skilja, at nakar flokkur á tingi skal hava ilt av hesum. Her áttu allir føroyingar at staðið sum ein og víst neyðugt moralskt dirvi heldur enn eftirlæti.

**Sosialurin**

## Míni royndir av Orðabókagrunninum við Kára á Rógvi sum formanni

KÁRI DAVIDSEN



**Fjórði partur**

Í teimum fyrstu 5 uppskotunum var einki tal av leitorðum sett á, bert orðingar sum: "hetta handrit skal fevna um umleið helvt av leitorðunum og vavi størra handritsins, serliga teimum ið mest viðkomandi eru til skúlabrúks." Tað størra handritið er knapt 120.000 leitorð. Frá 6. uppskotinum kemur so eitt stutt ískoyti upp í somu orðing, og nú ljóðar hon: " hetta handrit skal fevna um umleið helvt av leitorðunum og vavi størra handritsins (í mesta lagi 60.000 leitorð), serliga teimum ið mest viðkomandi eru til skúlabrúks." Her er tað mín hugsan, at Kári á Rógvi og hansara nevnd hugsa sera stutt og lágt, tí eitt og hvørt annað mál úti í heimi hevði verið fegið um at fingið eina so rúgvismikla orðabók á marknaðin – bara ikki Kári á Rógvi og Orðabókagrunnurin. Tí Jóannes Eidesgaard, løgmaður, kom við hugtakinum "Visjón 2015, men við slíkum undangongumonnum í Orðabókagrunninum, so verður visjónin neyvan frægari enn tað sama. Men støðan skuldi gerast alt verri, tí Hjalmar Petersen tók seg úr nevndini, tí hann var farin uttanlands í lestrar- og granskingarørindum.

Nú kom nýggjur limur, Jógvan í Lon Jacobsen, í nevndina hjá Orðabókagrunninum, tí hann skuldi sambært "§3 2. stk. Tryggjast skal, at ein av limunum er málfrøðingur við føroyskum sum sergrein og hevur góðan kunnleika til orðabókaarbeiði." og nú bar av. Orsøkin man helst vera hon, at vit báðir komu í or(ð)rustu um orðabókapolitikk á fundi millum nevndina í Orðabókagrunninum og meg. Nú kom so aftur eitt nýtt uppskot frá Orðabókagrunninum við Kára á Rógvi, og hesa ferð ljóðaði uppskotið soleiðis: " hetta handrit skal í mesta lagi hava 40.000 leitorð, serliga slík ið eru viðkomandi til skúlabrúks. Nú gingu so aftur nakrir mánaðir, tí Kári á Rógvi elskar at seigpína fólk við tíðini. Lat meg vísa á eitt dømi. Í telduposti t. 06.11.07 sendir Kári á Rógvi mær sera høviskan soljóðandi teldupost: "Góði Navnin. Orsaka, at eg ikki svaraði, tá ið tú sendi uppskot um semju. Vit hava fund í næstu viku, og tá vóni eg at fáa hetta uppá pláss. Ringi til áðrenn fundin." Kári á Rógvi, hví mundi tú senda mær henda teldupost, Jú, tað var tí, at fólkatingsval stóð fyri framman 12.11.07, og tú óttaðist, at eg møguliga fór at vísa á, hvør hesin Mr. Hyde eisini er. Næsta vika fór afturum, og tær so líkt, lætst tú væl av tíð ganga afturat, tí so verður Kári Davidsen tað moyrari. Tú gjørdi fyrst vart við teg aftur t. 7. desembur 2007, t.v.s. ein helan mánað seinni við eini hóttanarorðing "Tvinnir kostir". Í seinastu ert tú gitin fyri at siga: "at hevur samgongan trupulleikar av nøkrum revolvaramonnum, so skulu vit nokk plaffa teir niður" (Sitat eftir Kára á Rógvi á landsfundi hjá Sjálvsstýrisflokkinum 2008). Her kanst tú tosað uppií, tí tú meira átøkur revolvaramanni hevur plaffað meg niður við sáttmálauppskotum. Men í nýggja árinum (stemplað 30.02.08) kom so aftur eitt nýtt og seinasta uppskot frá Kára á Rógvi sum formanni í samráð við og tilmæli, (neyðareggið, sum tað tók heilar 5 vikur at snikka saman) frá Martini Næs, nýggja deildarstjóra í Mentamálaráðnum, fyrst við somu orðing sum omanfyri. Men ikki nóg mikið við hesi orðing, tí seinni í sáttmálauppskotinum verður so enn greiðari dentur lagdur á: "Áðrenn 1. juli 2008 skal Kári Davidsen lata grunninum orðalista yvir tey leitorð (40.000 ella færri), ið skulu við í útgávuna." fyri kr. 1.150.000. Merkir hetta so eisini, at eg t.d. kundi gjørt eina skúlaversjón á 30.000 ella færri leitorð fyri hesar somu 1.150.000kr.?

Kári á Rógvi hevði tú kanska roknað við, at eg mundi fara at ot svara tær við at skriva ein so jánkasligan sáttmála undir. Nei! Men so neyðarsligur ert tú nú vorðin, at tú ikki tordi at venda tær til mín, men fór til mín sakførara fyri at frætta, hvussu leikur mundi fara víðari í málinum millum okkum báðar. Jánkasligt. Tú hevur jú alla tíðina vita, hvat tú ætlaði.

Hvussu følir tú teg, Kári á Rógvi, at vera skipari á einari tílíkari orðabókadangu? Kundi tú kanska hugsað tær at fingið ein týskan parlør á 4.500 leitorð - ella hvussu? Er tað kanska bara talið á orðabókum, sum tað snýr seg í tínum høvdi, men einki við vav og dygd annars? Er tað soleiðis orðabókasnillingurin, Jógvan í Lon hevur rátt tær til, so at eingin orðabók, sum Orðabókagrunnurin varðar av, skal vera størri í vavi enn Móðurmálsorðabókin, sum er uml. 65.000 leitorð, so hon kann vera slagskipið. Ein móðurmálsorðabók, sum greiðir frá leitorðum á móðurmálinum, er nakað annað enn ein fremmandaorðabók, sum týðir og tulkar tey fremmandu leitorðini? Hvør orðabókin krevur síni fakfólk!

Sum formaður átti tú at sligið nevan í borðið og sagt við Jógvan í Lon Jacobsen, at minni enn tað upprunaliga uppskotið á 60.000 leitorð, sum Hjalmar Petersen var við at góðtaka, vildi tú ikki finna teg í, men tað vart tú hvørki maður ella enn minni formaður fyri. Bæði tú og tey flestu vita, at mítt orðabókahandrit liggur beint undir 120.000 leitorðum. Skamm fái hann, ið ikki hugsar ilt um slíkt.

**Framhald**

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.